Fylgiskjal 5

LM-066/2023

FFG – Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

uvmr@uvmr.fo

Tórshavn, tann 31. oktober 2023

Hoyringsvar til uppskot til broytingar í Vinnufelaglógini v.m. – Mál.nr. 23/18810

Víst verður til teldupost tykkara 3. oktober 2023 við uppskoti til broytingar í Vinnufelaglógini (VFL), Vinnufyritøkulógini og lóg um Vinnurekandi grunnar og tryggingarvirksemi.

Nevndin í Felagnum Føroyskir Grannskoðarar (FFG) hevur gjøgnumgingið uppskotið til broytingar í nevndu vinnulógum og tekur nevndin yvirskipað undir við, at dagføra reglurnar um innheinting, skráseting, varðveitslu v.m. av upplýsingum um veruligar eigarar v.m.

Annars hevur FFG hesar ítøkiligar viðmerkingar og tilmælir til broytingar til lógaruppskotið:

1. Felagið er samt í ásetingum í lógaruppskotinum, at tað nú eisini í VFL verður heimilað at útvega upplýsingar um veruligar eigarar til m.a. grannskoðarar, sum sambært hvítvasklógini eru álagt sum meginreglu ikki at stovna handilssamband við kunda áðrenn kundakunnleikamannagongd er gjørd.

2. Broyting til § 179,2,2 í VFL tekur felagið undir við, at nágreina, at eftir útbýtan er fulnaður fyri bæði felagskapitali og bundna tiltakspeninginum. Ella sum vanligur praksis er, at einans frí eginpeningurin kann útbýtast.

3. Broytingar til § 225,9 í VFL at tvingsilsavtaka felag fyri ógoldið ársgjald ávikavist 700 kr./ár og 1.200 kr./ár metir FFG er eitt víðfevnt stig at heimila. Staðin fyri verður mælt til at varðveita verandi skipan, sum øll onnur vinna arbeiði við til dagligt, at nýta innheintingarreglurnar.

4. Sbr. § 58 a,9 verður heimilað landsstýrsimanninum við kunngerð at áseta nærri reglur um skráseting, atkomu til og kunngerð av upplýsingum í kt-skipan Skráseting Føroya. Mælt verður til, at FFG fær allar tílíkar kunngerðir til hoyringar áðrenn ígildissetan.

5. Sbr. § 58a,4 er álagt høvuðsleiðslu felagsins í minsta lagi eina ferð um árið at kanna, um broytingar skulu gerast til veruligu eigarar í kt-skipan Skráseting Føroya og úrslitið við skjalprógvum skulu leggjast fyri ársaðalfund felagsins. Er tørvur at leggja fyri aðalfundin, tá leiðslan er vitandi um at ongar broytingar eru? Hví ikki siga tá broytingar eru, skal úrslit og skjalprógv leggjast fyri aðalfundin til góðkenningar.

Tað skal viðmerkjast, at vit hava ikki gjøgnumgingið uppskotið við atliti at meta um, hvørt løgfrøðiligu viðurskiftini eru í lagi.

Vinarlig heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Olaf Frits Joensen formaður	Fróði Sivertsen næstformaður	Jóhannes Færø peningarøkil	Alvi S. S. Nielsen skrivari